# LEIÐBEINANDI LESIÆTLAN

fyri

# KUNNINGARTØKNI Í UNDIRVÍSINGINI



MENTAMÁLARÁÐIÐ
Desember 2005

# Innihaldsyvirlit

Innihaldsyvirlit .......... 2

Lesiætlan fyri kt .......... 3

Undirvísingin hevur til endamáls: .......... 3

Inngangur .......... 3

Sum kt-førleiki er at rokna .......... 4

1. undirvísingarpartur .......... 5

Kt-økini arbeitt verður við eru: .......... 5

Undirvísingarinnihald .......... 5

Undirvísingartilgongdir .......... 7

2. undirvísingarpartur .......... 9

Kt-økini, arbeitt verður við, eru: .......... 9

Undirvísingarinnihald .......... 9

Undirvísingartilgongdir .......... 11

3. undirvísingarpartur .......... 13

Kt-økini, arbeitt verður við, eru: .......... 13

Undirvísingarinnihald .......... 14

Undirvísingartilgongdir .......... 15

# Lesiætlan fyri kt

**Undirvísingin hevur til endamáls:**

- at næmingarnir læra at brúka vanligastu kt-amboðini.
- at næmingarnir sjálvir læra at taka støðu til, nær kt er rætta amboðið

## *Inngangur*

Í álitinum ”Kunningartøkni í fólkaskúlanum”, sum var latið landsstýrismanninum í mentamálum í mars 1998, verður á síðu 4. sagt: „Avgerðin um, at Føroyar skulu vera eitt kunningarsamfelag, er tikin“.
Eisini verður í sama stað sagt: „Umráðandi er, at allir næmingar skúlans fáa umstøður til at menna sín hug til lærdóm gjøgnum kt. Skúlin skal tí geva næmingunum møguleikar til at kunna seg við teldur og teldunýtslu, so teir síggja KT sum eitt týðandi fjøltáttað amboð: sum læritól í undirvísingini, sum eitt hent samskiftistól og sum eitt amboð til at ogna sær upplýsingar og vitan“.
Í hesum orðingum er greið ábending um at hugsa kunningartøknina inn í undirvísingina.
kt eigur at gerast ein natúrligur partur av undirvísingini. Heilt frá fyrsta flokki, tá ið børnini koma í skúla, eiga tey at møta kt sum parti av undirvísingini. Kt eigur at vera líka sjálvsøgd, sum bøkur, pappír og onnur amboð.
At ogna sær kt-førleika eigur at vera eins sjálvsagt og tað at læra at lesa, skriva og rokna.
Tey trý hegnini at duga at lesa, skriva og at rokna verða rópt mentanarhegni. Hesi seinastu árini er roknað við einum nýggjum mentanarhegni. Tí fjórða. Fjórða mentanarhegni er kunningartøkni.
Umframt at kunningartøknin víðkar um innihaldið í verandi mentanarhegnum, so kann hon eisini fatast sum fjórða mentanarhegni.
Tey, sum duga fjórða mentanarhegni, hava førleika til at nýta kt, tá ið tað er hóskandi. Tey hava grundleggjandi fatan av nær og í hvørjum førum tað loysir seg at nýta kt og nær, tað er best at lata vera.

At duga fjórða mentanarhegnið er:

- at kenna til at móttaka og senda um internetið
- at kenna til margmiðlar og nettænastur
- at duga at leita og finna upplýsing í talgildum keldum og vinna sær vitan úr upplýsingunum
- at skilja og nýta talgild tekn til at vísa og gera viðurskifti úr veruleikanum sjónlig

- duga at fáa nyttu úr møguleikunum, sum liggja í at teldur kunnu nýtast til sýna fram og gera livandi
- duga at nýta kt í samskifti

## *Sum kt-førleiki er at rokna*

- førleiki at brúka telduna og tær eindir, ið náttúrliga hoyra til,
- førleiki at velja og nýta hóskandi amboð til ávísa uppgávu,
- førleiki at finna upplýsingar og meta um tær
- førleiki at viðgera upplýsingar og seta tær fram fyri onnur,
- førleiki at samskifta við onnur og
- førleiki at virka í tykissamfelagnum.

Í § 5. í fólkaskúlalógini verður sagt, at ”í undirvísingini skulu næmingarnir hava høvi at ogna sær sannkenning og teir arbeiðshættir, ið eyðkenna einstøku lærugreinina”.
Við tí í huga, sum sagt er um kt í fólkaskúlanum, so viðføra orðingarnar í § 5. í fólkaskúlalógini, at kt verður sjálvsagdur partur av undirvísingini.
Tað er tí ábyrgdin hjá hvørjum einstøkum lærara at taka kt inn í undirvísingina.

kt er í dag vorðin ein rættiliga stórur partur av gerandisdegnum hjá okkum bæði heima og í samfelagnum. Skúlin eigur at vera ein mynd av samfelagnum, og skal brynja næmingarnar til lívið uttanfyri skúlan. Tí er umráðandi, at kt verður tikin við inn í undirvísingina í øllum lærugreinum skúlans, har hon er ein natúrligur partur. Fyrimunirnir at brúka telduna eru eyðsýndir, tá hugsað verður um møguleikarnar at næmingalaga undirvísingina, arbeiða sjálvstøðugt og/ella í bólkum, so næmingarnir fáa avbjóðingar, sum svara til teirra støði. Møguleikarnir við telduni at samskipa tekst, myndir, animatión og ljóð geva fjølbroyttar hættir at viðgera evni og lýsa tey so ymisliga, at einstaki næmingurin kann nýta eina tilgongd, ið júst hóskar honum.

Í hesi leiðbeinandi lesiætlan verður víst á, hvørjar førleikar næmingar eiga at fáa høvi til at ogna sær í hvørjum av teimum trimum undirvísingarpørtunum. Eisini verður víst á, í hvørjari lærugrein ymsu kt-greinirnar kunnu koma inn.

Roknað verður við trimum undirvísingarpørtum, sum vanligt hevur verið í øðrum lesiætlanum.

Henda leiðbeinandi lesiætlan er ætlað at vera grundarlag undir skúlans lesiætlan.

## 1. undirvísingarpartur

Í 1. undirvísingarparti er arbeiðið við kt á einum byrjanarstøði, har miðað verður ímóti, at næmingarnir fáa grundleggjandi KT-førleika.

### Kt-økini arbeitt verður við eru:

- Teldan og íbundnu eindirnar
- Tekstviðgerð
- Framløguforrit
- Rokniark
- Internet og teldupostur
- Myndaviðgerð
- Ljóðviðgerð
- Dátuhandfaring

## *Undirvísingarinnihald*

### Næmingarnir eiga í 1. undirvísingarparti at læra

- at kenna vanligastu nøvnini á búnaði: Mús, knappaborði, skíggja o.s.fr
- at kenna knappaborðið
- at brúka músina
- at tendra og sløkkja teldu og forrit
- at logga inn og logga út
- at finna, heinta og goyma fílu
- at prenta
- at fara væl um útbúnaðin
- at hava góðar arbeiðsvanar

Tøknin kann nýtast í flestu lærugreinum. Niðanfyri er eitt yvirlit yvir lærugreinir, har ymisku kt-førleikarnir kunnu venjast.

Flokstoymið varðar av undirvísingini.

### Føroyskt, danskt, heimstaðarlæra, kristnikunnleiki og handaverk og list.

Tekstviðgerðar-/framløguforrit, samskifti um net og teldu, myndir, ljóð og tilfar av netinum eru ein náttúrligur partur av amboðum í hesum lærugreinum og lærugreinasamstarvi teirra millum.

**Í tekstviðgerð/framløguforriti eiga næmingarnir at læra:**

- at skriva tekst
- at byrja nýtt skjal
- at flyta seg í tekstinum, strika og rætta
- at angra
- at avrita og seta inn
- at skriva stórar og smáar stavir
- at sniðgeva tekst
- at broyta skriftstødd og lit
- at seta reglubrot
- at seta inn myndir í tekst
- at broyta stødd á mynd (vídd á síðuni)
- at broyta ljósstyrki og kontrast í mynd
- at goyma í egnum mappum og heinta
- at goyma tekst á øðrum stað ella við nýggjum navni
- at fáa kunnleika til prentara og prenting

**Í samskiftisforriti eiga næmingarnir at læra:**

- at brúka og fara um brúkaranavn og loyniorð
- at lata upp, skriva, senda og svara brøvum
- at tosa saman/kjatta
- at senda og lata upp viðfesti (tekst, myndir, ljóð)
- at læra um vandar við telduposti (virus, spam)
- at nýta góðan samskiftissið

**Í sambandi við alnetið eiga næmingarnir at læra:**

- at leita fram tilfar
- at ikki allar heimasíður eru líka gagnligar

**Í myndaviðgerð eiga næmingarnir at læra:**

- at skanna eina mynd
- at taka myndir og heinta tær úr myndatólinum
- at gera einfaldar myndir

**Í sambandi við ljóð á telduni eiga næmingarnir at læra:**

- at stýra ljóðstyrki
- at stýra ljóðavspælara
- at taka upp ljóð og goyma

### Støddfrøði

Rokniarkið er ein natúrligur partur av undirvísingaramboðunum í støddfrøði.

**Í rokniarki eiga næmingarnir at læra:**

- at skyna á puntum, røðum og teigum og nøvnum teirra
- at skriva tekst, tøl ella einfaldar frymlar + og - í ein punt
- at byrja nýtt skjal (ark/mappu)
- at broyta puntstødd
- at flyta seg í arkinum, strika og rætta
- at angra
- at avrita og seta inn
- at nýta rokniarkið sum roknitól
- at síggja broytingarnar, tá ið tøl verða broytt
- at heinta og goyma í egnum mappum
- at goyma á øðrum stað ella við nýggjum navni
- at fáa kunnleika til prentara og prenting

## *Undirvísingartilgongdir*

### Føroyskt

Dømi um undirvísingartilgongdir, sum kunnu nýtast í føroyskum:

- Les bøkur við ljóði frá t.d. fløgu
- Ger eina søgu við t.d. ljóði og myndum
- Skriva eina søgu
- Skriva smáar yrkingar
- Skriva søgu ella tosa eini boð og send við telduposti
- Tak myndir og ger framløgu við myndunum
- Smá hoyrispøl

### Støddfrøði

Undirvísingartilgongdir, sum kunnu nýtast í støddfrøði:
Brúka rokniark at loysa smærri uppgávur, eitt nú tá tølini eru ólagalig
Gera taltalvu 1 – 100 og lita t.d. 2 tabellina
Einfalda handilsrokning: Brúka lýsingarbløðini at keypa eftir, skriva prísirnar og finna samlaðan prís
Hava 100 kr, keypa ymiskt og finna fram til, hvussu nógv er eftir

### Heimstaðarlæra

- Undirvísingartilgongdir, sum kunnu nýtast í heimstaðarlæru:
- Taka myndir av t.d. søguligum plássum, bygningum, bátum o.ø. Skriva eina frágreiðing um myndina og prenta – framsýning
- Taka myndir og gera framløgu um myndirnar

- Vitja arbeiðsplássið hjá foreldrunum, taka myndir, gera frásøgn

### Danskt

Undirvísingartilgongdir, sum kunnu nýtast í donskum:

- Lesa bøkur við ljóði frá fløgu.
- Gera eina søgu við t.d. ljóði og myndum

### Handaverk og List

Undirvísingartilgongdir, sum kunnu nýtast í H&L:

- Tekna eina mynd í einum tekniforriti, goyma og prenta hana
- Seta ymiskar myndir saman og t.d. spegla og venda lutmyndir
- Gera ein kalendara við myndum, sum næmingarnir hava teknað
- Mynda (visualisera) yrking

## 2. undirvísingarpartur

Í hesum undirvísingarparti eigur at verða miðað eftir, at næmingarnir fáa høvi at menna tann førleika, teir hava ognað sær í fyrsta undirvísingarparti.

### kt-økini, arbeitt verður við, eru:

- Teldan og íbundnu eindirnar
- Tekstviðgerð
- Framløguforrit
- Rokniark
- Internet og teldupostur
- Myndaviðgerð
- Ljóðviðgerð
- Dátuhandfaring

**Harumframt verður arbeitt við hesum økjum:**

- Stýrikervi
- Margmiðlar
- Rættstavarar og orðabøkur
- Bókasavnsøki

### *Undirvísingarinnihald*

**Næmingarnir í 2. undirvísingarparti eiga umframt tað í 1. parti at læra**

- um stýrikervið (teknsett, klokka, stýring av gluggum, klippiborð, ógilda v.m.)
- at nýta fíluskipanina (stifinder)
- at flyta, avrita og strika fílu
- um vandan við yvirdrivnari teldunýtslu
- um teldutrygd, antivirus og tryggan atburð á netinum
- miðvíst at finna og heinta upplýsingar og tilfar á netinum
- keldukritikk og rættindi
- at samskifta um netið
- at viðgera talgildar myndir og ljóð
- blindskrift
- at nýta rættstavara og orðabók á teldu

Tøknin kann nýtast í flestu lærugreinum. Niðanfyri er eitt yvirlit yvir lærugreinir, har ymisku kt-førleikarnir kunnu venjast.

Flokstoymið varðar av undirvísingini.

## Føroyskt, danskt, enskt og kunningarlærugreinirnar.

Tekstviðgerðar-/framløguforrit, samskifti um net og teldu, myndir, ljóð, tilfar av netinum, bókasavnskunnleiki og margmiðlar eru ein náttúrligur partur av amboðum í hesum lærugreinum og lærugreinasamstarvi teirra millum.

**Í tekstviðgerð/framløguforriti eiga næmingarnir at læra:**

- at skriva tekst við rættstavara
- at merkja tekstin á ymiskan hátt (t.d. [Alt]+høgra músaklikk)
- at sniðgeva tekst og síðu
- at innseta talvu
- at seta inn myndir og tekningar
- at seta teigar og síðu- og teigaskift
- at gera ”síðuhøvd/-fót”
- at gera slóðir
- at handfara tekst og innsettar lutir

**Í samskiftisforriti eiga næmingarnir at læra:**

- at brúka kalendara
- at lýsa seg sjálvan (resumé)
- at umfara og handfara viðfesti
- at prenta ein teldupost
- at senda teldupost til fleiri í senn
- at lesa og skriva í eina ráðstevnu
- at læra vanligar siðsemisreglur fyri teldupost

**Í sambandi við alnetið eiga næmingarnir at læra:**

- at kenna kagan og brúka tær vanligastu funkurnar
- at heinta upplýsingar av netinum
- at avrita og seta inn
- at prenta frá kaganum
- at goyma tekst, vevsíður og myndir sum fílu til framhaldandi viðgerð
- at meta um kelduna og sannleikan í upplýsingunum
- at leita við leitimaskinum
- at brúka bókamerkir í kaganum

**Í myndaviðgerð eiga næmingarnir at læra:**

- at broyta myndastødd (bæði í vídd og tyngd)
- um einfalda myndatøku sum t.d. motiv, fokusering og ljós
- at brúka talgildað myndatól
- at flyta myndir úr talgildaðum myndatóli í teldu og goyma tær í ávísari mappu
- um myndasnið (bmp, jpg) og upploysn
- at goyma í øðrum myndasniði
- at viðgera myndir (manipulera), snara, spegla, seta saman, kloyva

**Í sambandi við margmiðlar eiga næmingarnir at læra:**
- at brúka og kanna vevsíður á neti ella fløgu, har tekstur, mynd og ljóð verða brúkt saman
- at gera framseting, har tekstur, mynd og ljóð eru partur

**Í sambandi við bókasavnskunnleika eiga næmingarnir at læra:**
- at finna vitan úr bókum, teldufløgum og interneti
- at brúka útlánstelduna á bókasavninum
- at finna fram bøkurnar á telduni og á hillunum

### Støddfrøði

Rokniarkið er ein natúrligur partur av undirvísingaramboðunum í støddfrøði.

**Í rokniarki eiga næmingarnir at læra:**
- at gera einfaldar roknifrymlar við variablum
- at prenta ávís øki
- at seta upp ritmyndir og prenta tær út
- at sniðgeva tekst og síðu

## *Undirvísingartilgongdir*

### Mál- og kunningarlærugreinirnar

Undirvísingartilgongdir, sum kunnu nýtast í føroyskum, donskum og enskum:
- Ávegisskriving á teldu
- Skriva grein um ávíst evni
- Floksblað
- Sjónleik
- Skrivligt avrik har bara leitað verður á internetinum eftir teksti og myndum
- Webquest
- Skriva ferðasøgu (framhaldssøga)
- Ger eina framsýning frá einari útferð
- Skriva eitt lesarabræv (á ráðstevnuni) og kjakast um tað
- Ger heimaarbeiði um teldupost
- Savna inn eygleiðingar dagliga, t.d. um veðrið ella djór, og send til annan móttakara.

### Støddfrøði
Undirvísingartilgongdir, sum kunnu nýtast í støddfrøði:

- Brúka rokniarkið sum eina roknimaskinu (matematisk model). Eitt tal broytist, og alt roknistykkið verður umroknað
- Brúka rokniarkið, tá ið nógv tøl skulu setast greitt upp
- Innskriva nøkur tøl, sum skulu gerast til ritmynd
- Loysa ymiskar uppgávur um teldupost

### Handaverk og List

Undirvísingartilgongdir, sum kunnu nýtast í H&L:

- Ger eina teknirøð
- Myndatøkukapping. (T.d. besta mynd av ……)
- Myndafrásøgn
- Myndayrking (seta myndir saman, og t.d. manipulera)

## 3. undirvísingarpartur

Í hesum undirvísingarparti eigur at verða miðað eftir, at næmingarnir fáa høvi at menna tann førleika, teir hava ognað sær í hinum undirvísingarpørtunum. Undirvísingin eigur at verða løgd soleiðis til rættis, at næmingar kunnu fata kt sum sera viðkomandi og náturligan part av gerandisdegi sínum bæði í og uttan fyri skúlan. Tí eigur undirvísingin og tey dømi, ið nýtt verða, at hava sín uppruna í gerandisdegnum hjá næminginum.

kt í seinasta undirvísingarparti snýr seg mest um tað amboðið, ið ger næmingin føran fyri at:

- leita upp tilfar
- lata snøgg avrik úr hond
- hava framløgur, ið gera boðskapin greiðari og áhugaverdari hjá áhoyrara
- samskifta við onnur
- loysa truplar uppgávur

### kt-økini, arbeitt verður við, eru:

- Teldan og íbundnu eindirnar
- Tekstviðgerð
- Rokniark
- Alnet og teldupostur
- Myndaviðgerð
- Videoupptøka og videoviðgerð
- Ljóðviðgerð
- Framløguforrit
- Dátuhandfaring
- Stýrikervi
- Margmiðlar
- Rættstavarar og orðabøkur
- Bókasavnsøki

**Harumframt verður arbeitt við hesum økjum:**

- Dátugrunnar
- Heimasíðugerð
- Uppseting av teksti og myndum v.m.

## *Undirvísingarinnihald*

Í 3. undirvísingarparti eigur at verða arbeitt framhaldandi við tí, sum nemingurin hevur lært í 1. og 2. undirvísingarparti.

Nemingurin eigur nú at hava so góðan kunnleika til kt, at hann sjálvur er førur fyri at velja tey kt amboð, hann skal brúka í undirvísingini.

### Mál og kunningarlærugreinirnar.

Tekstviðgerðar-/framløguforrit, samskifti um net og teldu, myndir, ljóð, tilfar av netinum, bókasavnskunnleiki og margmiðlar eru ein náttúrligur partur av amboðum í hesum lærugreinum og lærugreinasamstarvi teirra millum.

### Tekstviðgerð

**Í tekstviðgerð/framløguforriti eiga nemingarnir at læra**

- at flyta tekst, myndir, tekningar og farmyndir úr einum forriti í annað.
- at ritstjórna, sniða og umbróta tekst og myndir.

### Margmiðlar

**Í myndaviðgerð eiga nemingarnir at læra:**

- at handfara (manipulera) myndir
- at seta myndir saman
- at læra um etik á hesum øki

### Videoupptøka og videoviðgerð

**Filmsupptøkur eru nógv nýttar í samband við verkætlanina. Tí er umráðandi, at nemingar duga:**

- at handfara videoupptakara
- at viðgera videoupptøku
- at brenna fløgu

### Støddfrøði

Rokniarkið er ein náttúrligur partur av undirvísingaramboðunum í støddfrøði

**Í rokniarki eiga nemingarnir at læra:**

- at brúka rokniarkið at loysa tørførar uppgávur
- at brúka og broyta frymlar

- at vísa tøl sum ritmyndir
- at flyta tekst, myndir, tekningar og ritmyndir úr einum forriti í annað

**Dátuhandfaring**

- Her eigur at verða komið inn á, hvørjir fyrimunir og vansar eru við skráseting
- Royndir verða gjørdar við einføldum dátugrunnum

## *Undirvísingartilgongdir*

**Undirvísingartilgongdir, sum kunnu nýtast í mál- og kunningarlærugreinum**

- Leita eftir tilfari á bókasavni um alnetið
- Leita á alnetinum eftir tilfari í sambandi við evnisarbeiði og tvørgreinaligt arbeiði
- At nýta teldupost í samskifti við næmingar. Møguleikin hjá næmingum at senda ávegis uppgávur til læraran, og fáa rættingar og vegleiðingar sendandi aftur. (t.d. ávegisskriving)

**Myndaviðgerð**

- Næmingarnir arbeiða við somu mynd, broyta lit, kontrast o.a. Aftaná práta teir um, hvussu broytingarnar ávirka myndina og boðskapin.

**Støddfrøði**

Undirvísingartilgongdir, sum kunnu nýtast í støddfrøði

- Gera fíggjarætlan yvir flokksveitslu, ferðir o.a.
- Loysa líkningar
- Seta úrslitini frá rennidegnum inn í rokniarki (tøl, stabbar)
- Útrokna miðalhitan seinastu vikuna
- Støddfrøðin í einari pappeskju: Rúmd, vídd o. s. fr.

**Dátuhandfaring**

Undirvísingartilgongdir, sum kunnu nýtast

- Næmingarnir kunnu hóskandi skráseta 10 tær bestu, fløgu og videosavn teirra.
- Brævflætting